Lógaruppskot: hækking av frádráttarfríari inntøkuupphædd fyri fólkapensjónistar

Trivnaðarnevndin 26 okt 2023

BÚSKAPARRÁÐIÐ

LM-021/2023


Skrá

- Gongdin í pensjónum samanbering við lønarvøksturin
- Støðan hjá pensjonistum samanborið við
- Haldføri - hava vit ráð?

Gongd í tøkari inntøku hjá pensjónisti og einum løntakara (limur í starvsmannafelagnum)

Gongdin í realari inntøku

Realur pensjónsvøkstur og realur lønarvøkstur fyri útvaldan lønarbólk, 1993-2022



Viðm.: Mynd tekur útgangsstøði í støkum fólkapensjónisti uttan aðra inntøku. Fyri arbeiðandi verður útgangsstøði tikið í støkum persóni uttan børn við løntum arbeiði samsvarandi lønarflokk 4, stig 7 í sáttmála Starvsfelagsins. Árini undan 2009 er sjúkrakassagjaldið sett eftir sjúkrakassagjaldinum í Tórshavnar kommunu frá 2002-2009. Kringvarpsgjaldið er skráðsett sum skattur frá 1997 og frameftir. Allir aðrir skattir eru stillaðir eftir galdandi skattatalvum í inniverandi ári (kommunuskattur og kirkjuskattur eitt miðal úr øllum kommunum í landinum).


Kelda: Almannamálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Taks.

Støðan hjá pensjonistum samanborið við løntakarar - eru pensjonistar verri fyri?

Inntøkan eftir skatt

Skipanin í dag

Útgoldið eftir skat og arbeiðsmarknaðargjøld, pensjón til pensjónist og A-inntøka hjá løntakara



Viðm.: Grundupphædd í pensjónini er skattafrí, og fólkapensjónistar gjalda ikki arbeiðsmarknaðargjøld fyri uttan heilsutrygd (175 DKK/mðr. + 0,7% av skattskyldugari inntøku). Harafturat er kringvarpsgjaldið hjá pensjónisti 50 kr./mðr., meðan persónur í arbeiðsfjøld skal gjalda 150 DKK/mðr. Hjá løntakara er inntøkan mánaðarlig A-inntøka. Landsskattur er ásettur eftir skattatalvum hjá Taks, arbeiðsmarknaðargjøld á 4,86% umframt heilsutrygd. Kommunuskattur er ásettur á 20% og kirkjuskattur er ásettur á 0,6%. Barnafrádráttur er ikki íroknaður.


Kelda: Almannaráðið, Taks og egnar útrokningar

Pensjónistur hevur **meiri** at liva fyri enn miðallønt/ur Heilsuhjálpari

Heilsuhjálparin **rindar til** pensjónistin og sum **harumframt** hevur børn at forsyrgja og hús at rinda

Skipanin í dag

Útgoldið eftir skat og arbeiðsmarknaðargjøld, giftur pensjónistur og løntakari (ikki pensjónistur)




Viðm.: A-inntøkan hjá pensjónistum er sett at hækka við 15% eftir pensjónsaldur er rokkin, tí teir ikki spara upp til tvungna eftirløn (flestu alment løntu hava sáttmálasetta eftirløn á 15%). Ársinntøka hjá arbeiðsfjøld er A-inntøka.Grundupphædd í pensjónini er skattafrí, og fólkapensjónistar gjalda ikki arbeiðsmarknaðargjøld fyri uttan heilsutrygd (175 DKK/mðr. + 0,7% av skattskyldugari inntøku). Harafturat er kringvarpsgjaldið hjá pensjónisti 50 kr./mðr., meðan persónur í arbeiðsfjøld skal gjalda 150 DKK/mðr. Hjá løntakara er inntøkan mánaðarlig A-inntøka. Landsskattur er ásettur eftir skattatalvum hjá Taks, arbeiðsmarknaðargjøld á 4,86% umframt heilsutrygd. Kommunuskattur er ásettur á 20% og kirkjuskattur er ásettur á 0,6%. Barnafrádráttur er ikki íroknaður.

Kelda: Almannaráðið, Taks og egnar útrokningar

Skipanin í dag

Útgoldið eftir skat og arbeiðsmarknaðargjøld, stakur pensjónistur og løntakari (ikki pensjónistur)



Viðm.: A-inntøkan hjá pensjónistum er sett at hækka við 15% eftir pensjónsaldur er rokkin, tí teir ikki spara upp til tvungna eftirløn (flestu alment løntu hava sáttmálasetta eftirløn á 15%). Ársinntøka hjá arbeiðsfjøld er A-inntøka.Grundupphædd í pensjónini er skattafrí, og fólkapensjónistar gjalda ikki arbeiðsmarknaðargjøld fyri uttan heilsutrygd (175 DKK/mðr. + 0,7% av skattskyldugari inntøku). Harafturat er kringvarpsgjaldið hjá pensjónisti 50 kr./mðr., meðan persónur í arbeiðsfjøld skal gjalda 150 DKK/mðr. Hjá løntakara er inntøkan mánaðarlig A-inntøka. Landsskattur er ásettur eftir skattatalvum hjá Taks, arbeiðsmarknaðargjøld á 4,86% umframt heilsutrygd. Kommunuskattur er ásettur á 20% og kirkjuskattur er ásettur á 0,6%. Barnafrádráttur er ikki íroknaður.
Kelda: Almannaráðið, Taks og egnar útrokningar

CHAPTER ONE

Gray Dawn


How the Coming Age Wave Will Transform America -- and the World

(C) 1999 Peter G. Peterson All rights reserved. ISBN: 0-8129-3195-5

- In particular, they will have to acknowledge that it may be impossible to reconcile rapid demographic aging with today's generous "pay-as-you-go" retirement systems--a misleadingly cheerful phrase that really means "hand-to-mouth" financing, in which a static or shrinking working-age population supports a rapidly growing retired population. Direct cash transfers from the working young to the nonworking old are now the norm throughout the developed world. But how does a politician inform voters that the benefits being paid to today's retirees cannot be sustained for tomorrow's?

Tað verður neyðugt at viðurkenna at tað kann blíva ómøguligt at **samantvinna skjótu broytingina í fólkasamansetingini** og verandi gávumildini í verandi **"pay-as-you-go"** pensjónskipan …. ein "**hond-til-munnur**" fígging har eitt lækkandi lutfall í arbeiðsførum aldri skal forsyrgja einum vaksandi parti á pensjón.

Men hvussu kunna politikarar upplýsa veljarar um, at tær veitingar, ið verandi arbeiðandi ættarlið rindar til pensjónistar, ikki eru tøkar tá hesi somu, sum nú rinda, gerast pensjónistar?



Population Aging and the Generational Economy

A Global Perspective

Ronald Lee

Professor of Demography and Jordan Family Professor of Economics, and Director, Center for the Economics and Demography of Aging, University of California, Berkeley, USA

Andrew Mason

Professor of Economics, University of Hawaii at Manoa, and Senior Fellow, Population and Health Studies, East-West Center, Hawaii, USA

Edward Elgar
Cheltenham, UK • Northampton, MA, USA

1. Population aging and the generational economy: key findings

Andrew Mason and Ronald Lee

The goal of this study is to improve our understanding of how changes in population age structure are influencing national economies. Until recently changes in age structure were favorable for most countries as populations became increasingly concentrated in the working ages. For some countries in Asia and most in Africa, this trend continues today. But elsewhere – in the West, East Asia, and Latin America – the share of the working-age population is in decline or soon will be, as the share of the elderly population grows. Many concerns have been raised: bankruptcy for publicly funded health care and pensions systems, slower economic growth and possibly decline, unfair treatment of children vis-à-vis the elderly, the collapse of financial markets, and the burdening of future generations, to name a few.

Effectively addressing the economic challenges of population aging is especially difficult, for two reasons. The first is that countries cannot rely exclusively on their own experience because in any given country changes in population age structure are occurring for the first time. Hence it is essential to learn from societies that have been the first to experience the age transition. The second problem is that many issues are addressed in piecemeal fashion, relying on partial and incomplete data. This study addresses this problem by relying on a newly developed system of accounts, National Transfer Accounts. Of course, there are many outstanding studies of these issues, and we draw upon them; but many questions remain, and myths and misunderstandings persist about the economic implications of changes in population age structure.

- ✓Søguliga vaksandi tal av fólki í arbeiðsførum aldri, men nú er vend komin í.
- ✓Nýggjar avbjóðingar sum vit ikki hava sæð fyrr - ikki lætta at finna loysnir sum eru royndar.
- ✓Stórar avbjóðingar
  - ✓ hægri útreiðslur orsaka av fleiri eldri,
  - ✓ broyttum búskapi tí eldri hava annað nýtslumynstru enn yngri (lægri nýtslu, færri lán),
  - ✓ trýst á pensjónsøkið,
  - ✓ órættvísi millum ættarlið (td. millum tað tilfeingið sum er tøkt td. eldri fáa størri part av tilfeinginum enn børnini)
  - ✓ órættvísi millum tey sum rinda og fáa “pay as you go” merkir at tey ið arbeiða rinda fyri tey sum ikki arbeiða umvegis skattin, men tey ið ikki arbeiða hava fleiri atkvøður.

Vit senda rokningina víðari til okkara børn

Politikararnir vita, hvat er neyðugt at gera - men teir gera tað ikki. Kemur ikku broyting í, fara vit ikki at hava ráð til tær vælferðartænastur, vit hava í dag, sigur formaðurin í búskaparráðnum

Áki Bertholdsen

– Búskapararligt haldfarið merkir, at vit, eisini í framtíðini, hava ráð til at varðveita sama vælferðarsamfelag, sum vit hava nú.

Tað sigur Fróði Magnussen, formaður í búskaparráðnum.

Men hinvegin staðfestir hann eisini, at sum stoðan, veksa tær almennu útreiðslurnar meiri enn inntøkurnar.

– Vit verða alsamt fleiri eldri og tað fer at leggja stórt trýst á eldraroktina. Serliga fer talið á fólki yvir 80 ár at veksa helt nógv og tað eru ikki mnst tey, sum fara at krevja nógv av almannaverkinum og heilsuverkinum, sigur Fróði Magnussen.

Framskrivingar vísa nevniliga, at um 20 ár er talið á fólki yvir 80 ár, dupult so stórt, sum tað er nú.

– Tað merkir, at almennu útreiðslurnar fara at veksa nógv hesi næstu árini. Harafturat er stoðan tann, at aldarssamansetingin broytist nógv, so at vit vera lutfalsliga fleiri eldri og færri yngri.

Formaðurin í búskaparráðnum vísir á, at fyri 30 árum vóru vit 6,5 fólk, sum vóru í arbeiði fyri hvønn pensjonist. Nú, í 2020, eru vit 4 - 4,5 fólk í arbeiði fyri hvønn pensjónist, og um bara 20 ár vera vit ikki meiri enn 2,5 fólk, sum arbeiða fyri hvønn pensjónist.

Hann sigur, at tað varð steinur oman á byrðu, at vit eru farin at forskatta pensjónirnar.

– Tað var ein skeiv avgerð at forskatta pensjónirnar, tí tað ger búskaparliga haldfarið upp aftur verri enn tað longu er frammanundan, sigur hann.

Hevði tað av ollum íllum verið so, at inntøkan av forskattingini av pensjónum varð løgd til viks, ella varð brúkt til at rinda skuld við, var tað sínar sakir.

– Men veruleikin er, at tað verður hvørt oyra brúkt og avleiðingin av tí, er, at um nokur ár, hava vit eitt lítið tal á fólki í arbeiðsførum aldri, sum rindar skatt, og eitt stórt tal á pensjónistum, sum ikki rindar skatt.

– Summir politikarar tosa ofta um, at pengarnir skulu fylgja barnunum. Teir skulu heldur syrgt fyri, at pengarnir fylgja pensjónistinum, heldur formaðurin í búskaparráðnum fyri.

– Tað merkir, at vit vera nógv færri skattgjaldarar til at bera byrðarnar og tryggja vælferðarsamfelagið.

Fróði Magnussen sigur, at í lotuni leggur búskaparráðið seinastu hond á eina frágreiðing um, hvat krevst av figgjarligum tiltokum um árið fyri at vit kunnu varðveita okkara vælferðarsamfelag, um tað er nú.

Men ein útrokning frá 2015 vísir, at tí hóvdu vit ein haldføris-indikator uppá minus 5. Hetta merkir at tað er neyðugt við eini varandi figgjarpolitiskari herðing, sum svarar til fimm prosent av bruttotjóðarúrtokuni fyri at tryggja, at skuldin, ella ognin, hjá tí almenna verður tann sama í framtíðini, sum hon er nú.

Og í 2015 svaraði tað til uraleið 750 milliónir.

Í dag er bruttotjóðarúrtokan nógv hægri, so í dag skuldi effektiviseringar, sparingar, ella eitt sindur av hvørjum, finnast fyri yvir eina milliard um árið.

Hetta hava vit ikki figgjarligt haldfarið til

Men nú hevur samgongan haraftarat lovað veljarunum stórar batar. Arbeiðsvikan skal styttast, umframt at ávísir bólkar skulu hava eitt lønarlyft, og so skal skatturin hjá lág- og miðaløntum eisini lækkast.

– Samstundis hava vit eisini alla tíðina eitt ynski um alsamt at bota um okkara vælferðartænastur í heilsuverkinum, almannaverkinum og í skúlaverkinum.

Haraftarat verður arbeitt við risastórum ætlanum, sum Suðuoyartunli fyri einar 4-6 milliardir, lestrarbýlingi á Frælsinum, umframt ílagur í ymsar tunlar, og annað.

> »Tað var ein skeiv avgerð at forskatta pensjónirnar, tí tað ger búskaparliga haldfarið upp aftur verri«

– Vit hava ikki figgjarliga haldfarið til hetta, staðfestir Fróði Magnussen.

Hann vísir á, at longu nú hava vit hálvgum kreppu á eldraøkinum, tí tað er vorðið so dýrt, at tað er ein trupulleiki hjá kommununum.

Og tað er eisini stórt trot á arbeiðsmegi.

Formaðurin í búskaparráðnum uggar okkum við, at hetta er bara byrjanin, og verða eingi stig tikin, fer tað at vera nógvar ferðir verri í framtíðini.

– Vit hava bara sæð byrjanina á haldføristrupulleikanum í Foroyska búskapinum, leggur hann aftarat.

Og útreiðslurnar á eldraøkinum er ikki eitt val, tí tað kemur av sær sjálvum. Tað er eingin sum hugsar sær, at vit skulu hava eina verri eldraokt enn vit hava nú, og tí verður tað ein risaútreiðsla á framtíðini, leggur hann aftarat.

Hetta ferður ein útreiðsla, vit ikki sleppa undan, so antin vera tað vit, sum lyfta hanavella lata vit komandi ættarlið taka sær av tí.

– So tað, politikararnir fyribils hava gjort, er at skúgva avgerðirnar, og tokningina, yvir á okkara børn, ella á komandi ættarlið, sigur formaðurin í búskaparráðnum.

Lurta ikki

Fróði Magnussen sigur, at tað eru gjørdar nógvar frágreiðingar um hesi viðurskifti, so politikarar vita hvat krevst fyri at vit kunnu varðveita okkara vælferðarsamfelag.

Men tað verður eingi stig tikin sum muna, og politikarar lurta ikki eftir teimum ráðum, teir fáa.

Tvørtur ímóti kava teir lovað skattalætta, styttri arbeiðsviku, og lønarhækking, sum setir enn storri krav til figgjarpolitikkin.

Sum stoðan er nú, er ikki samanhangur í búskapinum. Hinvegin hava fleiri serfrøðingarbólkar gjørt uppskot um hvussu vit fáa ein betri haldføran búskap.

Eitt nú varð mælt til at hækka pensjónsaldurin. Tað var í 2009 kom eitt álit um at hækka pensjónsaldurin og varð tað tilmælið ýtlgt, hevði pensjónsaldurin verið 68,5 ár í dag.

Men tað verður eisini neyðugt at almenni raksturin verður effektivari.

– Vit hava knýtt samfelagið saman við vegum, brúnum og tunlum, eisini undirsjóvartunlum. Men vit gagnnýta ikki teir fyrimunir vit hava av hesum, tí vit bróka ikki teir møguleikar, hetta góða ferðasambandið gevur okkum at rationalisera.

– Tískil hava vit nógvar dupultfunktiónir við bara nokrum fáum kilometrum ímillum, sigur formaðurin í búskaparráðnum.

Eitt dømi, sum áður er nevnt, er Akstovan, sum ætlaði at miðsavna virksemið í Eysturoy og í Klaksvík, í eina miðstøð í Gotudali.

Fyribils er tað dottið niður fyri av mótstøðu, bæði úr Klaksvík og úr Runavík, tí tey vildu ikki missa almenn arbeiðspláss.

Eitt annað dømi er, at vit hava sama slag miðnámsskúla bæði í Klaksvík og í Kambsdali. Røddir hava eisini verið frammi um at rationalisera heilsuverkið, men tað elvir altíð til stóra lokal-politiska mótstøðu.

Enn veit eingin, hvat ein Suðuroyartunnil fer at kosta.

– Men siga vit at hann kostar 6,4 milliardir og landskassin klárar at gera ílagur fyri 800 milliónir um árið, svara tað til at allar aðrar ílagur muga bíða í átta ár, staðfestir formaðurin í búskaparráðnum.

– Tað er ikki veruleikakent, at allar aðrar ílagur skulu bíða í átta ár, leggur hann aftarat.

Gongdin krevur at tiltøk verða sett í verk

Fróði Magnussen sigur, at tað, sum krevst, er, at Landið og kommunurnar leggja eina langtíðar ílagrætlan, og harumframt má raksturin effektiviserast og pensjónsaldurin má hækkast.

Hann heldur, at tað eru stórir møguleikar fyri at reka samfelagið skynsamari

Eitt nú kunnu heilt stórar sparingar gerast í eldraøkinum við at bygga stórri eldrabýli og við at taka tær teknisku loysingar í brúk, sum eru á marknaðinum.

Haan saknar eisini, at vit hava fleiri eldraíbúðir úti á Foroyum, sum kunnu vera eitt millumlið ímillum heimið og roktarheimið.

– Ein stórur partur av teimum eldru hevdu klárað seg fint í eini eldraíbúð, og tær eru nógv bligari enn eitt pláss á roktarheimi.

Og í skúlaskipanini hava vit nógvar smáar skúlar, sum ger fólkaskúlan dýran at reka. Eisini á hesum øki eru møguleikar fyri at leggja samar.

At hetta er ikki bara fyri at spara pengar, men tað hevðu eisini fort eini munandi betri tænastu við sær, heldur Fróði Magnussen.

Men alt hetta er ein spurningur um, hvussu ílogurnar skulu raðfestast.

– Tað er eisini ein veruleiki, at vit síggja alsamt fleiri almennar stovnar, og í flestu førum er talan um sjálvstøðugar stovnar, heldur enn at royna at legga stovnar saman.

– Vit skulu bara gera okkum greitt at tað kostar pengar, leggur hann aftarat.

Verja politikarar ímóti sær sjálvum

Fróði Magnusen sigur at eitt, Búskaparráðið hevur eisini mælt til, er, at vit fáa eitt figgjarpolitiskt regluverk, sum tað verður kallað.

Í hovusheitum merkir tað, at greiðar reglur verða settar fyri, hvussu nógv tær almennu útreiðslurnar kunnu okjast um árið.

Men tað er alt avgeraadi, at eisini kommunurnar verða umfataðar av hesum reglunum. Samstundis er tað avgeraadi, at óvæntaðar inntøkur, og einstakar inntøkur, verða settar í ein búskapargrunn, ella at tær verða brúktar til at rinda skuld við.

Hann heldur nevniliga, at ein orsok til, at einki verður gjørt fyri at tryggja tað búskaparliga haldfarið, er, at tíðirnar eru so góðar, at í lotuni hava politikarar hava ráð til at bróka pengarnar.

– Í royndi og veru er eitt figgjarpolitiskt regluverk sostatt við til at verja politikarar ímóti sær sjálvum, og at hjálpa teimum at standa ímóti krovumi um meira nýtslu, serliga í góðum tíðum sigur Fróði Magnussen.

Men so hevur tað eisini altíð verið eitt tilmæli, at politiski myndugleikin skal ikki fara ein politikk, har nógv verður brúkt í góðum tíðum, og lítið í ringum tíðum.

Tað rætta er at tálma útreiðslunum í góðum tíðum fyri at hava nakað at standa ímóti við í verri tíðum.



– Um nokur ár, hava vit eitt lítið tal á fólki í arbeiðsførum aldri, sum skal figgja vælferðarsamfelagið og eitt stórt tal á pensjónistum, sum ikki rindar skatt, sigur Fróðu Magnussen, formaður í búskaparráðnum




BÚSKAPARRAÐIÐ

Føroyski búskapurin er ikki haldførur!


Gongdin higartil og útlit (komandi trýst)

Landskassaúrslitið RLÚ, vanligir postar, 1998-2024 **Mynd I 16**




Viðm.: RLÚ í leypandi prísum og sum brøkur av BTÚ. 2022-2024 eru metingar.
Kelda: Gjaldstovan, Fíggjarmálaráðið og Búskaparráðið.

Almennar nýtsluútreiðslur í mió. kr. og árligur %-vøkstur, 2000 til 2024 **Mynd I 13a**




Kelda: Uppgerð hjá Hagstovu Føroya árini 2000-2021, 2022-2024 eru egnar metingar.

Tal av pensjónistum




Viðm.: 2023-2062 eru framroknaði tøl. Talið av pensjónistum er talið av fólki omanfyri pensjónsaldur. Pensjónsaldurin hækkar til 67,5 ár í 2025 og 68 ár í 2030
Kelda: Egnar útrokningar við støði í fólkatalsframrokningini hjá Hagstovu Føroya.

Lutfall millum abeiðsfjøld og pensjónistar



Fólkasamansetingin


Fólkatalspyramida 1985, 2018 og 2060 **Mynd 3.4**



Kelda: Hagstova Føroya
Viðm.: 2060 eru framroknaði tøl


Stór tilgongd av 80+ og 90+ ára gomlum

Tilgongd av 80+ ára gomlum



Viðm.: Tal av fólki árliga (miðal yvir 5 ár).
Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.


80+ og 90+ ára gomul, 1985-2060



Vaksandi talið av 80+ og 90+ ára gomlum fer at leggja **stórt trýst á útreiðslurnar til eldrarøkt**

Viðm.: 2021-2061 eru framroknaði tøl.
Kelda: Hagstova Føroya.

Demografiskar avbjóðingar



- Greining hjá Búskaparráðnum í 2015 vísti, at einstaklinga kostaðurin til almannamál (herundir eldrarøkt) økist munandi við aldrinum. **Einstaklinga kostnaðurin er serliga høgur fyri elstu aldurbólkarnar**, tí fleiri í hesum aldursbólkum búgva á **røktarheimi**.
- Sostatt kemur vaksandi talið av 80+ og 90+ ára gomlum (teimum mest útreiðslutungu) at **leggja trýst á kommunukassarnar,** tí at tørvurnin á eldrarøkt kemur at vaksa.
- Ein systemiskur váðið

Útreiðslurnar fara at veksa frá inntøkunum

- Útreiðslurnar til eldraøkið koma at vaksa mest orsakað av demografisku broytingini.

- Hjá **landinum** kemur broytta aldurssamansetingin hjá føroyingum í framtíðini, at leggja **trýst á útreiðslur til heilsuverkið og pensjónir.** Landið hevur millum annað møguleika fyri at **hækka pensjónsaldurin** fyri at lætta um trýstið.

- Hetta verður eisini ein trupulleiki fyri **kommunar**, tá ið tær hava lægri inntøkugrundarlag enn landið, umframt at tær hava **avmarkaðar møguleikar fyri at økja um inntøkurna**r til kommunukassan.

- Heimild og ábyrgd hjá kommununum?

Niðurstøðan;

- Bert gera lógarbroytinganar um fíggjarligt rásarúm er

- Framskriva árin av øllum fíggjarligum broytinum fram í tíð (5ár, 10ár, 15ár, 20ár fram)

Niðurstøða

-> Tað er rímiligt at mótrokna

-> Vit hava ikki ráð til eina tílíka gávu við stóru avbjóðingunum við haldførinum frammanfyri okkum

-> Við broytingini hækka tit enn meira um munin millum pensjonistin og lønmóttakaran. Pensjonistin, sum frammanundan er væl fyri

-> Lønmóttakarin hevur børn at forsyrgja og hús at rinda

-> Pensjónisturin hevur neyvan børn at forsyrgja og húsini eru útgoldin

Takk fyri

Appendix

Vísa farnu broytingar eitt økt útboð at arbeiðsmegi?

Settu frádráttarfríu inntøkuna niður á 45.000 (frá 61.900) og mótrokningina niður á 20% (frá 60%)

Fallandi arbeiðsluttøka hjá pensjónistum

Arbeiðsfjøld 67-74 ár skift á arbeiðsmarknaðarstøðu og 1 ára aldur (2019 og 2022)

	2019			2022			Broyting 2019-2022		
	Arbeiðs fjøld	**Fólkatal**	**Arbeiðs-fjøld í %**	**Arbeiðs fjøld**	**Fólkatal**	**Arbeiðs fjøld í %**	**Arbeiðs fjøld**	**Fólkatal**	**Arbeiðs fjøld í %**
67 ár	360	524	**69**	326	538	**61**	-34	14	**-8**
68 ár	316	543	**58**	277	514	**54**	-39	-29	**-4**
69 ár	282	542	**52**	272	547	**50**	-10	5	**-2**
70 ár	221	557	**40**	228	504	**45**	7	-53	**6**
71 ár	184	495	**37**	182	524	**35**	-2	29	**-2**
72 ár	135	478	**28**	158	526	**30**	23	48	**2**
73 ár	111	419	**26**	129	534	**24**	18	115	**-2**
74 ár	98	411	**24**	112	469	**24**	14	58	**0**
Tilsamans	1.707	3.969	**43**	1.684	4.156	**41**	-23	187	**-2**

Kelda: Hagstova Føroya

Effekt av at mótrokningini:
Fallandi arbeiðsluttøka hjá pensjónistum

Arbeiðsfjøld 67-74 ár skift á arbeiðsmarknaðarstøðu og 1 ára aldur (2018-2022)

	2018			2019			2020			2021			2022			2019-2022
	Arbeiðs fjøld	Fólkatal	Arbeiðs fjøld í %	Arbeiðs fjøld	Fólkatal	Arbeiðs fjøld í %	Arbeiðs fjøld	Fólkatal	Arbeiðs fjøld í %	Arbeiðs fjøld	Fólkatal	Arbeiðs fjøld í %	Arbeiðs fjøld	Fólkatal	Arbeiðs fjøld í %	Arbeiðsfjøld, broyting
67 ár	392	553	**71**	360	524	**69**	357	547	**65**	316	519	**61**	326	538	**61**	**-8**
68 ár	319	550	**58**	316	543	**58**	308	519	**59**	304	545	**56**	277	514	**54**	**-4**
69 ár	271	565	**48**	282	542	**52**	267	533	**50**	276	515	**54**	272	547	**50**	**-2**
70 ár	215	504	**43**	221	557	**40**	201	540	**37**	212	528	**40**	228	504	**45**	**6**
71 ár	172	484	**36**	184	495	**37**	161	551	**29**	178	530	**34**	182	524	**35**	**-2**
72 ár	140	428	**33**	135	478	**28**	148	489	**30**	150	548	**27**	158	526	**30**	**2**
73 ár	117	421	**28**	111	419	**26**	102	469	**22**	117	478	**24**	129	534	**24**	**-2**
74 ár	80	417	**19**	98	411	**24**	87	415	**21**	94	456	**21**	112	469	**24**	**0**
Tilsamans	1706	3922	**43**	1707	3969	**43**	1631	4063	**40**	1647	4119	**40**	1684	4156	**41**	**-2**

Kelda: Hagstova Føroya